gult12 cyan12 magenta12 svart12



VIÐMERKINGAR

# Fyribyrgingarráðið - spurningar og svar um tubbak - »Hví tað loysir seg at gevast«

**Fyribyrgingarráðið**
*Grein 2 av 5*

**Fyribyrgingarráðið hevur fyrireikað eina røð av greinum í sambandi við tiltøk, sum verða Altjóða Tubbaksfría Dagin - 31. mai. Tey verða at síggja tær næstu tvær vikurnar og fevna um eitt úrval av tubbaks umrøðuevnum.**

Eg havi roykt í 20 ár. Er ikki longu ov seint?

Nei, tey góðu tíðindini eru, at tað er ongantíð ov seint at gevast. Tú skerjir vandan fyri sjúkum, íð standast av tubbaki næstan alt fyri eitt, tú heldur uppat at roykja.

Sjálvandi er betri, skjótari tú gevst.

**Eftir: 20 minuttum** - tekur nøgdin av tubbakseitri at minka, og blóðtrýstið, hjartaslátturin og pulsurin verða aftur, sum tey eiga at vera. Hetta ger, at vandin fyri hjartaslagi minkar.

**12 tímum:** nøgdin av kolsúrevni í blóðinum minkar, og nøgdin av súrevni økist.

**einum mánaði:** fert tú at duga betur at meta um, hvussu okkurt angar og smakkar. Lungnapípurnar verða smidligari, so tað verður lættari hjá tær at draga andan djúpt. Kroppurin hevur stríðst við at endurbøta nervalagið. Tú fert kanska at varnast, at tú orkar meira.

**tveimum til trimum mánaðum:** fært tú kanska 30% av lungnavirki aftur. Tú fert at orka meira og føla, at tú fært gjørt fleiri kropsvenjingar.

**seks til nýggju mánaðum:** útlitini til, at tú fært lungnasjúku, eru minni, tí kyknurnar, sum klæða lunguni, nú aftur verða so, sum tær skulu vera og gera sítt til, at lunguni hjá tær eru rein og heilsugóð.

**einum ári:** vandin fyri, at tú fært hjartasjúku, er skorin niður í helvt. Tú hevur eisini skert vandan fyri striki, lungnasjúku og fleiri sløgum av krabbameini, teirra millum lungna-, hálsa- (lívmóðurhálsa-), bløðru- og nýrakrabba og krabba í brisi, barkakýli og vælindi.

**fimm árum:** vandin fyri, at tú fært lungnakrabba er umleið helvtina av vandanum hjá honum, íð roykir ein pakka um dagin.

**tíggju árum:** vandin fyri, at tú fært lungnakrabba, er næstan líka lítil sum hjá einum, íð ikki roykir. Frískar kyknur eru komnar ístaðin fyri tær kyknur, íð koma áðrenn krabbameinskyknurnar koma.

(Tikið úr 'Tá ið síðsta sigarettin er roykt', Amerikanska tubbaksráðið 1995, 1996)

Gevst tú at roykja, minkar tú eisini vandan fyri, at tey, sum eru uttan um teg og anda roykin frá tær niður í seg, verða sjúk.

Legg-av pakkar verða aftur seldir á apotekunum um landið 29. - 31. mai fyri 25 kr.

Hygg eftir seðilinum, sum verður í bløðunum vikuna áðrenn, klipp hann út og nýt hann til at keypa pakkan, sum inniheldur nikotin tyggigummi.

# Semjan millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag / Klaksvíkar Arbeiðsmanna- og Kvinnufelag er partvís orðarøtt avskriving av sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag

**Føroya Arbeiðarafelag Havnar Arbeiðskvinnufelag**
*Tórshavn, tann 15-05-01*

Sambært semingsuppskotinum, sum lagt varð fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag øðrumegin og Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík hinumegin, verður víst til skjal 1, sum er partur av semingsuppskotinum, sum góðkent varð av pørtunum 08.05.01.

Hetta skjal avdúkur, at ongar samráðingar hava verið millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsmannfelag / feløgini í Klaksvík um teir spurningar sum um-røddir verða í hesum semjuskjali.

Viðvíkjandi grein 7 og 8 so er teksturin beinleiðis skrivaður av eftir tí sáttmála sum Føroya Arbeiðara-felag og Havnar Arbeiðskvinnufelag eftir tógvi stríð fingu arbeiðsgevararnar at undirskriva í samband við sáttmálasamráðingarnar 2001.

Tað sum undrar okkum í hesum sambandi er, at fakfeløg sum í 1999 als ikki høvdu uppskot frammi um hesar broytingar, í ár skulu fáa forerandi tær sømdir, sum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag vegna umleið 8.000 limir sínar stríddust fyri í 1999.

Hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag tykist munur at vera á, hvat navn fakfelagið ber, tá sømdir skulu latast limum felagsins, tí nøkur feløg fáa ókeypis, tað sum onnur fakfeløg hava stríðst fyri, meðan Føroya Arbeiðsgevarafelag, tá talan er um onnur fakfeløg, við hond og fót tykist at royna at forða limunum í hesum feløgum at fáa bøtt um lønar- og setanarkor teirra.

Slíkur framferðarháttur sigur ikki so lítið um leiðsluna í Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fakfeløg sum royna at snulta seg fram til teir fyrimunir, sum onnur fakfeløg hava stríðst fyri.

# Hví heldur FAG at lógligt verkfall hjá vanliga løntakaranum er ábyrgdarleyst ?

**Føroya Arbeiðarafelag**
*Tórshavn, 15.05.2001*

Tað eyðkennir sjónarmiðini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, at alt tað sum fakfeløgini hjá teimum ófaklærdu gera fyri at bøta um korini hjá vanliga løntakarunum er ábyrgdarleyst.

Hví skal tað vera soleiðis, at alt verður gjørt fyri at forða teimum sum forvinna minst í samfelag okkara, at fáa eina rímuliga samsýning tá hann/hon skal selja arbeiðsmegi sína, tá eingin grettir orð um teir risastóru vinningar, sum handilsmenn og onnur vinnulívsfólk forvinna sær so at siga uttan at rætta hond frá síðu.

Tað tykist at vera soleiðis, at jú lægri tú ert á samfelagsstiganum, jú minni virðing hevur tú millum teir sokallaðu topparnar í samfelag okkara, har nakrir sita í nevndini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Tað er helst hesin hugburður sum sæst aftur í teimum úttalilsum, sum FAG kemur við, nú feløg okkara hava sett í verk eitt heilt lógligt verkfall.

# Leiðslan í Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgunum í Klaksvík stuðla verkfallsbrótarum

**Føroya Arbeiðarafelag**
*Tórshavn, 15.05.2001*

Fjølmiðlarnir hava seinastu dagarnir havt lýsingar frá fakfeløgum, sum boða frá, at ikki er loyvt limunum í hesum feløgum at átaka sær verkfallsrakt arbeiði.

Hvørki Havnar Arbeiðsmannafelag ella feløgini í Klaksvík hava tó havt slíkar lýsingar, men hin-vegin er formaðurin í Havnar Arbeiðs mannafelag endurgivin fyri at hava sagt, at hann ikki fór at forða limum sínum í at fara inn á økið okkara og taka á seg verkfallsrakt arbeiði.

Hetta er enn eitt prógv um, at leiðslurnar í Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgunum í Klaksvík bert tykjast hava atlit til síni egnu áhugamál, meðan tey als ikki hava áhuga á, at stuðla øðrum feløgum í stríði teirra.

Hetta er ikki sørt hugstoytt og spurningurin er um leiðslurnar her veruliga umboða hugsanina hjá vanliga liminum í hesum feløgunum, tí helst munnu flest allir fakfelagslimir síggja, at tað er eyðsýnt, at fakfeløg eiga at stuðla øðrum fakfeløgum í lovliga stríði teirra, og tað minsta ein kann rokna við er, at fakfeløg nokta limum sínum at átaka sær verkfalssrakt arbeiði.

Hetta er tó ikki hugsanin hjá leiðslunum í Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgunum í Klaksvík, men tað kundi verið, at hesi feløg einaferð koma at hava tørv á stuðli frá hinum fakfeløgunum í Føroyum, og tá fara tey at kenna hvussu týdningarmikið tað er við veruligum solidariteti, tí uttan mun til framferðina hjá núverandi leiðslunum í Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgunum í Klaksvík, so fara vit ,og helst øll onnur fakfeløg í Føroyum, at nokta limum okkara at taka upp verkfalls- rakt arbeiði uttan mun til hvat felag tað er sum hevur lýst verkfall.

# Magni Arge. Hvør heldur tú avgerð við hvørjum flogfelag limirnir í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag flúgva?

**Føroya Arbeiðarafelag**
*Tórshavn, 15.05.2001*

Magni Arge sigur við Sosialin 10. mai, at hann er stjóri og at hann kann gera tað sum hann hevur hug til og kann lasta flogfarið sjálvur.

Vit heita tí á limir okkara um at siga Magna Arge:

*Vit eru løntakarar, men vit avgera sjálvi við hvørjum flogfelag vit flúgva.*

Vit halda tað vera ikki sørt nasadjarvt, alment at boða frá, at stjórin vil taka upp arbeiði, sum limir í felag okkara á fuldt lógligan hátt hava lagt niður. Hin-vegin avdúkar hetta, at stjórin í Atlantic Airways ikki virðir demokratiska rættin hjá starvsfólki sínum, tá sáttmálaloysi er, at fara í verkfall fyri lønarkrøvum sínum.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur

Nr. 95 • leygardagur • 19. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



*Jákup á Borg dylur ikki fyri, at dysturin móti GÍ sunnudagin hevur alstóran týdning fyri FM-vónirnar hjá B36*

GÍ-B36:

# Toppdystur í Gøtu

**Annað vikuskifti á rað skal GÍ spæla oddadyst. Hesa ferð móti B36**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað er um tað mundi, at sólin aftur er farin at skína á fótbóltshugaðu Gøturnar. Við sigrinum á HB fyri viku síðani legði GÍ seg einsamalt á odda, og vinna teir aftur sunnudagin, verður henda oddastøða styrkt enn meira.

## Alt hevur týdning

Dysturin er tó ein av teimum, sum á pappírinum er sera torførur, og GÍ-venjarin, Johan Nielsen ásannar eisini, at talan er um eina sera týdningarmikla uppgávu, tó at hon ikki hevur so nógv størri týdning enn aðrar.

- Tá mann er í oddinum, so eru allir dystir týdningarmiklir. So er spurningurin bara, hvussu leingi mann er á odda, ljóðar filosofiska svarið frá venjaranum.

Johan Nielsen roknar annars við, at allir mans eru tøkir til dystin sunnudagin. Eingir skaðar gjørdu um seg í dystinum móti HB, og har umframt er Zdzislaw Janik nú aftur komin fyri seg, eftir skaðan, sum hann fekk í fyrsta umfari.

## Jens Kristian úti

Eisini í B36 ásanna tey, at dysturin móti GÍ hevur stóran týdning, hóast tað enn er stutt fráliðið í kappingarárinum.

- Hatta er sjálvandi ein sera týðandi dystur, sum vit vilja gera alt fyri at vinna. Tapa vit, so eru longu fimm stig upp til oddasessin, og tað kann gerast tungt at vinna aftur, heldur Jákup á Borg, tá vit spyrja hann um dystin.

Álopsleikarin roknar annars við, at burtursæð frá Jens Kristian Hansen, eru allir mans tøkir til dystin sunnudagin. Jens Kristian noyddist út í dystinum móti HB við eini fipurspreinging, og noyðist tí allar helst at binda frið í nakrar vikur.

FS Vágar-EB/Streymur:

# Lykladystur í Vágum

**Dysturin millum teir báðar seinastu uppflytararnar verður roknaður sum týðandi liður í botnstríðnum. Pólverjin Andrzej Pacek, verður møguliga við á liðnum hjá EB/Streymi**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Undan kappingini varð roknað við, at niðurflytingardysturin skuldi standa millum FS Vágar og EB/Streym, og tí hevur dysturin millum hesi bæði liðini væntandi alstóran týdning, tá spurningurin skal svarast.

Vágamenn tykjast tó at verða spentir til setningin. Ikki minst eftir tey bæði seinastu umførini, sum góvu ein sigur á Sandi og eitt tepurt tap móti NSÍ, sum við eitt lítið sindur av hepni kundi kastað stig av sær.

Hannus Olsen, sum er liðformaður hjá Vágamonnum, sigur, at tað helst verður á leið sama fólkið til dystin móti EB/Streymi. Birgir Joensen var ikki við móti runavíkingunum, men hann verður allar helst tøkur til hendan dystin.

## Fer at koma

Nýggja liðið í fyrstu deild eigur enn fyrsta málið og fyrsta stigið til góðar, men hóast hetta, so tykjast leikararnir í felagnum at vera bjartskygdir.

– Hetta er sjálvandi ein rættiliga týdningarmikil dystur hjá okkum, og hóast vit enn ikki hava vunnið, so hevur spælið slettis ikki verið so galið.

Hetta heldur Jón Sigurd Gleðisheygg, sum er ein av fáu monnunum við royndum hjá EB/Streymi. Hann viðgongur tó, at enn hava menninir nógv at læra, og at hesin lærdómurin bara má koma spakuliga, dyst fyri dyst.

– Eg ivist ikki í, at tað fer at gleppa hjá okkum fyrr ella seinni, og so má mann bara vóna, at vit ikki hava mist ov nógv til ta tíð.

Jón Sigurd sigur annars, at allir mans tykjast vera tøkir til dystin. Eingir skaðr gera um seg, og har umframt er Sorin Anghel nú aftur tøkur eftir leikbann.

Umframt hetta, so er møguleiki fyri, at ein nýggjur leikari verður at síggja á vøllinum sunnudagin. Andrzej Pacek hevur ikki megnað at bitið seg fastan á væl mannað B36 liðnum, og tí hevur hann nú skift til EB/Streym. Tá vit hóskvøldið tosaðu við Ísak Mikladal, aðalskrivara í FSF, hevði hann onga áheitan fingið um at flyta spæliloyvi, men hann vísti á, at um ein mánaður var liðin síðani seinasta dystin hjá Pacek fyri B36, skuldu eingir trupulleikar verið at skift felag, so tað kann væl hugsast, at uippflytararnir fara styrktir inn á vøllin sunnudagin.

HB-VB:

# Hvørgin vil missa

**Taparin av dystinum í Gundadali hevur fyri eina tíð mist sambandið við oddin, og tí fara bæði liðini eftir sigrinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað verða tvey svong lið, sum fara á vøllin í Gundadali sunnudagin. Heimaliðið, HB, tapti um vikuskiftið tveir týðandi dystir, og hetta tykjast leikararnir at vera sera uppsettir upp á at venda. Rúni Nolsøe, sum nú er liðskipari hjá HB, men sum eisini hevur verið stuðulsleikari hjá VB, sigur í øllum førum, at nú skulu HB-leikararnir reisa seg aftur.

- Skulu vit í oddin, so mugu vit vinna heimadystirnar, men tað verður sera tungt sunnudagin. Ikki minst, nú bæði Andrew og Jóhannis eru úti við skað.

Teir báðir landsliðsleikararnir vórðu báðir skaddir um vikuskiftið, men hinvegin tykjast allir hinir leikararnir at vera væl fyri. Sjálvur hevur Rúni vant við fullari ferð, eftir at hann annars hevur verið plágaður av skaða, og eisini er Bárður Mortansson nú um at koma fyri seg.

## Nýtt álop

Vágbingar taptu á heimavølli móti KÍ fyri viku síðani, og eisini hjá teimum er galdandi, at ein sigur er sera týdningarmikil hjá teimum.

Gisli Sveinbjørnsson, sum hevur verið skaddur, men sum verður við í hópinum hesa ferð, sigur, at teir í øllum førum fara til Havnar eftir sigrinum.

Hann ivast tó ikki í, at talan verður um eina torføra uppgávu. Robert Cieslewicz hevur leikbann, og harumframt dregist leikandi venjarin, Krzyztof Popczynski, við ein skaða í lærinum, og spurningurin tykist vera, um hann verður tøkur. Tað merkir so í øllum førum, at broytingar skulu henda í álopinum, men her tykjast vágbingar at hava ein lítlan trumf. Birgir Jørgensen hevur ikki vant so nógv í ár, men vandamikli maðurin hevur skotið hópin av málum triðju deild. Hesa ferð verður hann helst við á besta liðnum, og so er spurningurin, um hann megnar at halda VB í oddinum.